## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útnyrðingi og okkurt ælið, men seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn og mjørki. Seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og okkurt ælið, týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Barnafestivalurin bjóðar til sang og dans

Leygardagin 4. juli verður Grasagarður karmur um barnafestivalin, sum Margarinfabrikkin skipar fyri, og á skránni verður millum annað dansur, sangur og sjónleikur við børnunum í Margarinfabrikkini.

Tær seinastu vikurnar hava børn og ung í Margarinfabrikkini gjørt seg til reiðar at lata upp fyri ársins Barnafestivali, sum verður í Grasagarði 4. Juli. Tey hava millum annað vant nógv ymiskt, sum tey fara at framføra á festivalinum.

Starvsfólkini í Margarinfabrikkini hava tikið stig til at gera ein sjónleik, dans og sang, og hava tey fingið heldur forkunnuga hjálp til verkætlanina.

- Katrin Mortensen hevur ábyrgdina av sjónleikinum, har leikararnir bæði syngja og dansa. Dansinum skipar Gunn R. Joensen frá dansibólkinum Hóps fyri, og Guðrið Hansdóttir venur tey í sangi, greiða fyriskiparar frá.

Eisini eru bólkar, sum dansa og syngja, og millum annað verður vinnarin av Talentkappingini hjá Margarinfabrikkini, Hjalte, á pallinum saman við dansibólkunum Butterflies og The B. Boys, eins og nógv verður at hoyra frá teimum ungu á loftinum.

Tey ungu og børnini, sum hava sína dagligu gongd í fabrikkini, verða eisini sjónlig á arbeiðsøkinum á festivalinum. Tey eru í sølubásum og øðrum aktivitetum, og í uppruddingini .

Festivalurin byrjar kl. 11 og endar kl. 18

Meira kann lesast um barnafestivalin á heimasíðuni www.fabrikkin.fo




## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 15 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | 27 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 30 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 16 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. sunnan fyri Ísland kemur spakuliga hendavegin. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.

**Komandi nát:**
Lágtrýstið skamt eystan fyri Føroyar hvørvur eystureftir. Lágtrýstið eystan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/06 kl. 06⁰⁰ – 11/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í juni: -8,7° - Mesti hiti máldur í juni: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 10/06 kl. 06⁰⁰ – 11/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 3 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 10. juni | Mánin longst frá jørðini |
| 15. juni | Seinna kvarter |
| 22. juni | Tendring |
| 23. juni | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. juni | 03:14 | 15:35 | 02:14 | 14:35 | 02:29 | 14:50 | 05:14 | 17:35 | 06:14 | 18:35 | 01:29 | 13:50 | 00:29 | 12:50 | 03:29 | 15:50 | 04:29 | 16:50 | 02:59 | 15:20 | 04:14 | 16:35 |
| 19. juni | 03:58 | 16:21 | 02:58 | 15:21 | 03:13 | 15:36 | 05:58 | 18:21 | 06:58 | 19:21 | 02:13 | 14:36 | 01:13 | 13:36 | 04:13 | 16:36 | 05:13 | 17:36 | 03:43 | 16:06 | 04:58 | 17:21 |
| 20. juni | 04:47 | 17:13 | 03:47 | 16:13 | 04:02 | 16:28 | 06:47 | 19:13 | 07:47 | 20:13 | 03:02 | 15:28 | 02:02 | 14:28 | 05:02 | 17:28 | 06:02 | 18:28 | 04:32 | 16:58 | 05:47 | 18:13 |
| 21. juni | 05:42 | 18:11 | 04:42 | 17:11 | 04:57 | 17:26 | 07:42 | 20:11 | 08:42 | 21:11 | 03:57 | 16:26 | 02:57 | 15:26 | 05:57 | 18:26 | 06:57 | 19:26 | 05:27 | 17:56 | 06:42 | 19:11 |
| 22. juni | 06:41 | 19:12 | 05:41 | 18:12 | 05:56 | 18:27 | 08:41 | 21:12 | 09:41 | 22:12 | 04:56 | 17:27 | 03:56 | 16:27 | 06:56 | 19:27 | 07:56 | 20:27 | 06:26 | 18:57 | 07:41 | 20:12 |